

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Reingerðarfólk til Dagtilhaldið í Nólsoy

Søkt verður eftir **reingerðarfólki** til læknaviðtaluna og dagtilhaldið at arbeiða 4 tímar um vikuna at byrja 1. desember 2008.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við møguligum ummælum skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 21. november 2008.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Petricu »Disu« Christiansen, leiðara á dagtilhaldinum, telefon 32 70 34 ella 21 80 34.

## Reingerðarfólk til Býlingshúsið undir Brúnni

Søkt verður eftir eftir einum **reingerðarfólki** at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Býlingshúsinum undir Brúnni, Smærugøta 9b, 100 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 14. november 2008.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Turið Horn, leiðara, telefon 31 91 80.

## Húsavørðar til Høllina á Hálsi

Søkt verður eftir tveimum **húsavørðum** til fastlønt arbeiðið á Høllini á Hálsi. Badmintonhøllina og Tórsbreyt.

**Kommunan roknar við at tú**
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir
- hevur koyrikort

Tú skalt á skeið í skipaðum viðlíkahaldi av bygningum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini eru fulltíðarstørv og verða sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

**Umsókn**
saman við tilmælum og upplýsingum um royndir skal vera hjá Høllini á Hálsi, Postboks 1221, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 24. november 2008. Merkið umsóknina »Húsavørður«.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Dánjal Samuelsen, leiðara fyri Høllina á Hálsi, Badmintonhøllina og Tórsbreyt, á telefon 52 14 75.

Les meira um starvið á **www.torshavn.fo**

## Vaskifólk til Høllina á Hálsi

Vegna farloyvi søkir Tórshavnar kommuna eftir **vaskifólki** til Høllina á Hálsi og Badmintonhøllina.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er 20 tímar um vikuna og verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Starvið er tíðaravmarkað til 29. august 2009.

**Umsókn**
saman við tilmælum og upplýsingum um royndir, skulu vera hjá Høllini á Hálsi, Postboks 1221, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 24. november 2008. Merkið umsóknina »Vaskifólk«.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til leiðaran fyri Høllina á Hálsi og Badmintonhøllina Dánjal Samuelsen á telefon 52 14 75.

Les meira um starvið á **www.torshavn.fo**

## Pedagogar til Frítíðarskúlan Smílibýlið

Søkt verður eftir tveimum **pedagogum** at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja ávíkavíst 1. desember 2008 og 1. januar 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Frítíðarskúlanum Smílibýlið, Stoffalág 82, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 24. november 2008.

**Nærri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Joan Heinesen, leiðara, telefon 21 06 46.

**Tórshavnar kommuna**




Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo